## Nimbus vitjar Ellisakfør

Danski serfrøðingurin í Nimbus motorsúkklum, Preben Gerlach Herskind frá PHs Nimbus Service í Holbæk, vitjar í hølunum hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør leygardagin 8. august kl. 11.00. Preben er sjálvur mekanikari, og hann fer at ráðgeva og gera onkrar smáar umvælingar og stillingar av Nimbus motorsúklum. Nimbus eru danskar motorsúkklur, sum vórðu gjørdar frá 1918 til 1959, tá framleiðslan steðgaði. Nimbus vórðu nógv brúktar av danska herinum, politinum og postverkinum. Í dag eru umleið 3.500 Nimbus motorsúkklur í Danmark. Í Føroyum verður roknað við, at umleið 20 Nimbus eru kring um í landinum.



## Politikarar brúka hash

Løgreglan í Grønlandi hevur gjørt av, at hon ger einki við Josef Motzfeldt, landstingsformann, hóast hash varð funnið heima í stovu hansara. Men sambært Siumut-tingkvinnuni Doris Jakobsen er hash rættilga vanligt millum grønlendskar politikarar. Hon sigur við blaðið AG, at hon er sannførd um, at tað eru fólk í Landstinginum og í landsstýrinum, sum brúka hash. Doris Jakobsen sigur, at hon veit frá álítandi fólki, at tað eru hashmisbrúkarar í bæði Landstinginum og landsstýrinum, men at tey tíverri ikki tora at siga sannleikan alment.

# Samstarvsavtala um tilbúgving undirskrivað

**Av tí, at Vinstraflokkurin er í Føroyum á floksfundi kortini, so varð avtala um samstarv við tilbúgving millum Føroyar og Danmark undirskrivað á tilbúgvingarstøðini í Havn í gjár**

AVTALA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Søren Gade, verjumálaráðharri, og Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, skrivaðu undir avtaluna, sum í veruleikanum bara staðfesti samstarvið, sum hevur verið millum Føroyar og Danmark á tilbúgvingarøkinum síðan 1. januar 2007, tá Føroyar yvirtóku tilbúgvingina.

- Hetta er bara ein staðfesting av góða samstarvinum, vit hava havt. Ongin skundur hevur verið, og tí er avtalan ikki formliga undirskrivað fyrr enn nú, sigur Jacob Vestergaard.

Søren Gade greiðir frá, at hann fegnast at avtalan nú er undirskrivað, tí so kann arbeiðið, sum hevur verið fyrimyndarligt, staðfestast.

Spurdur um danski verjumálaráðharrin hevur tíð at vera í Føroyum, tá ófriður er bæði í Irak og í Afganistan, svarar Søren Gade, at hetta er fyrsta ferðin, at hann er í Føroyum, og at hann hevur verið í Afganistan einar 14 ferðir. Seinast fyri einum tveimum vikum síðan.

Arbeiðið, sum avtalan staðfestir, fevnir millum annað um førleikamenning og karmar fyri altjóða samstarv, umframt hvussu partarnir nýta hvønn annan í altjóða høpi.

At umsita hesa avtaluna, er ein bólkur settur við fimm limum, sum umboðað ávkavist Føroyar og Danmark.

Bólkurin skal hittast eina ferð um árið.



*Í gjár skrivaðu Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, og Søren Gade, verjumálaráðharri, undir samstarvsavtalu um tilbúgving*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# CTD-kanningar kunnu gerast í Føroyum

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur útgerð til atkanna fólk fyri CDT sjúkuna, men kanningarnar krevja fleiri starvsfólk**

CTD
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sum er, er tað Ríkissjúkrahúsið, ið kannar blóðroyndirnar av fólkunum, sum kannað verða fyri sjúkuna CTD.

Í gjár undrasðist Hans Atli Dahl, mýl-lívfrøðingur seg yvir, at kanningarfyritøka hansara Amplexia Genetics ikki er eftirspurd, tí henda fyritøkan kann gera roynirnar nógv bíligari enn Ríkissjúkrahúsið.

Fyri at minka um útreiðslurnar avhesum kanningum, vera møguleikanir kannaðir fyri at fáa eina fyritøku í Týsklandi at taka sær av royndunum.

Men hví ikki gera kanningarnar í Føroyum?

Á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni arbeiðir Debes Christiansen, sum er mýllívfrøðingur. Áðrenn hann eftir lokna útbúgving flutti til Føroya, arbeiddi hann á Ríkissjúkrahusinum á deildini, sum m.a. ger CTD-kanningar.

### Hava førleikan

- Jú, vit kunnu gera slíkar kanningar her. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur fakliga førleikan og útgerðina eisini, sigur Debes Christiansen.

Men beint nú hevur stovnurin ikki nóg nógv fólk til at fara undir slíkar kanningar, tí kanningarnar av H1N1 og av alifiski fara við nógvari orku.

Debes Christiansen sigur, at grundreglan er tann sama, tá ið ílegukanningar verða gjørdar av fólki og fiski.

Hann hevur gjørt sær nakrar tankar um, hvussu kanningarnar kundu verið lagdar til rættis. Um byrjað verður við ommum og abbum hjá teimum, sum antin eru sjúk ella berar, ber til at útiloka heilt nógv fólk, tí tá høvdu kanningarnar víst beinanvegin, hvør var berari, og hvør ikki var tað.

Debes Christiansen metir, at við at gera kanningina í Føroyum, hevði hvør kanning kostað nakrar hundrað krónur, og tað hevði bara tikið nakrar tímar at fingið úrslitið.